# Telvarin í Hu



*Vektarmaðurin Alvin og hansara talvfólk í Hundsarabotni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

LÍVIÐ

*Eftir Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Hundsarabotnur mikudagin seinnapartin í seinastu viku, ein av hesum døgunum upp undir jól, har tað ongantíð gjørdist ljóst. Uttan fyri á bilvektini stendur ein stórur lastbilur fullur av rúkandi asfalti. 16,3 tons verður rópt gjøgnum rútin. Bilurin er á veg til Gásadals, har asfalterað verður niðri í bygdini. Her er kalt her uppi millum fjøll. Kavin liggur niður í Skælingsfjall og nakað oman um Oyggjavegin, og asfaltið er heitt undir tí brúna dúkinum sum skal halda hitanum, so tað ikki stirnar heilt, áðrenn tað verða lagt á túnini í Gásadali. Flikrurnar týnast so skjótt tær raka brúna dúkin og verður broyttar frá kulda til flógvan damp. Tað er kalt hesa tíðina í Gásadali, tað mátti Uppsala Pætur eisini sanna fyri mongum árum síðan, men tað er ein heilt onnur søga.

Vit eru staddir í vektarrúminum í Hundsarabotni, har ein stórur partur av skervi og asfalti verður latið til høvuðsstaðin og meginøkið í Føroyum. Inni í vektarrúminum er 29 ára gamli sumbingurin Alvin Joensen krýndur kongur. Hann er ikki einsamallur kongur í hugnaliga kontrolrúminum, tí hann er telvari, talvið stendur frammi og har er ein svartur kongur og ein hvítur, eins og í øllum tvítalvum í heiminum. Og so hvørt sum Alvin flytir fólkið heldur blóðbaðið fram á teimum svørtu og hvítu puntunum

– Tað sær út sum eg telvi móti mær sjálvum, men tað geri eg ikki. Eg seti upp fyri at síggja leikirnar, og um eg telvi móti mær sjálvum, so vinnur altíð hin, hvør hann so er sigur Alvin smílandi. Hann er ein heitur sumbingur, sum dugir at skemta, hann er heilt ovfarin og kanska eitt sindur lotur av, at hansara friðaliga kongaríkið nú er fylt av journalisti og myndamanni og einum lítlum smádrongi. Her eru ikki gestir vanliga inni í rúminum. Gestirnir eru vanliga uttanfyri á vektini í stórum lastbilum, teir liva í einum heimi fyri seg, og Alvin livir í einum øðrum heimi fyri seg sjálvan, og teir hava tað gott saman.

## Sumbingur

Samleikin hjá Alvin liggur sunnast í Føroyum í ein útsynning. Hann er sumbingur og hóast hann hevur búð ymsastaðni í Suðuroynni og nú er vorðin ordiligur kollfirðingur, so kennir hann seg sum sumbing, og tað fer hann helst at gera restina av ævini. Men tað ber væl til hjá einum sumbingi at búgva norðanfjørðs uttan at fáa varandi mein av hesum ávum.

– Hjá mær kann tað gera tað sama hvar eg búgvi, eg trívist best í mínum egna selskapi og mítt egna selskap fái eg ríkiligt av her í Hundsarabotni, sigur Alvin og ressast í sessinum.

Vektarrúmið er lítið og tó er so fínt her inni. Eg illtonkji hann fyri at hava ruddað áðrenn vit koma, tí óruddiligari var fyrstu ferð, eg var her, og tað var seinasta summar. Men hann bedýrar, at hann einans hevur vaskað gólvið í samband við vitjanina. Her eru tríggjar teldur, og tað sær næstan út sum ein flogtorn við øllum knattunum. Hetta er ikki so ógvusligt, sum tað sær út til, roynir Alvin at sissa meg. Tann eina teldan stendur beinleiðis í samband við skrivstovuna hjá verkinum, tann eina er til heimabankan, so eg kann kanna um fólk hava goldið, tá tey koma eftir førningi, og so havi eg mína egnu privatu teldu, sum eg kann stytta mær stundir við, tá ið minni er at gera, sigur Alvin.

Og nær hevur hann lítið um at vera. Tað eru illveðursdagarnir, tá ið koyrilíkindini eru vánalig og tá ið illa liggur fyri at arbeiða kring landið. Hesir dagar eru langligir og tá fer telvarin í gongd. Eg telvi á telduni móti telvarum kring heimin. Tað er rættuliga spennandi. Eg havi enn ikki telvað móti nøkrum stórleikara, men eg telvi á netinum, sigur hann.